Javnstøðu nevndin

# Ársfrágreiðing 2023 hjá javnstøðunevndini

Samandráttur 3
1. Javnstøðunevndin 2023 4
2. Eftirlit og undantaksloyvi 5
Almennar nevndir og ráð 5
Undantaksloyvi 6
Ein umbøn um undantak frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum 6
Endurskoðan av klagumáli sbrt. lóg um at bannað mismuni orsakað av breki 6
3. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi 7
Umbøn um at søkja eftir kvinnuligum starvsfólki 7
Tvey undantøk at lýsa eftir ávísum kyni 7
Undantak at lýsa eftir mannligum stuðli 8
Áheitan á UMR viðv. Býarskipanarnevndini sbrt. jstl §8 8
Fyrispurningur um kynsbýtið í Barnaverndarstovnum 8
4. Vegleiðing um nýtslu av § 8 í javnstøðulógini 9
5. Hoyringar og tilmæli 9
Uppskot um broytt starvsheiti hjá løgtings- og landsstýrisfólki 9
Uppskot um at hækka hámarkið fyri barsilsútgjald 9
Tilmæli í sambandi við endurskoðan av fosturtøkulógini 10
Tilmæli um klædnareglur í fólkaskúlum 10
6. Kunnandi virksemi 10
Pallborðskjak á Háskúlanum 8. Mars 10
Framløga av javnstøðukanning 11
Semjuskjal 11
Mannfólkadagur 11
Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum 12
Ráðstevnan Forum Jämställdhet 2023 12
Norðurlendskur umboðsfundur í Stockholm 12
Arbeiðsdagur um abort 12
Týðing av kvinnurættindasáttmálanum 13
Týðing av heimasíðu til enskt 13
Kunning til útlendskar kvinnur 13
Barsilsreglur í almennum sáttmálum 14
7. Virkisøki og arbeiðssetningur 14
8. Nevndarlimir 15
9. Játtan 15



Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo

# Samandráttur

**Javnstøðunevndin, ið varð sett tann 26. apríl í 2023, hevur arbeitt við hesum málum:**

- luttikið í kjakinum um javnstøðu og javnstøðupolitikk
- havt eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin
- viðgjørt umbønir um undantaksloyvi í sambandi við starvslýsingar og kynsumboðan í almennum nevndum og ráðum
- avgreitt fyrispurningar um javnstøðu frá næmingum, borgarum, feløgum og stovnum
- skipað fyri og luttikið á tiltøkum og kunnandi virksemi um javnstøðu

**Samanumtikið kann sigast um 2023:**

- Javnstøðunevndin hevur evnað til eitt semjuskjal, ið liggur til grund fyri nevndararbeiðinum
- Javnstøðunevndin hevur viðgjørt fýra umbønir um undantak viðvíkjandi starvslýsingum
- Javnstøðunevndin hevur viðgjørt eina umbøn um undantak viðvíkjandi lógarásetingum um javna kynsumboðan í almennum nevndum og ráðum
- Javnstøðunevndin hevur sent eina áheitan viðvíkjandi lógarásetingum um javna kynsumboðan í almennum nevndum og ráðum
- Javnstøðunevndin hevur givið út týðing av kvinnurættindasáttmálanum hjá ST til føroyskt
- Javnstøðunevndin hevur týtt partar av heimasíðu sínari til enskt
- Javnstøðunevndin hevur givið tvey tilmæli í javnstøðumálum

Á fíggjarlógini fyri 2019 varð samtykt, at leggja játtanirnar fyri javnstøðunevndina og Demokratia saman í eina høvuðskonto, og at økja samlaðu játtanina við 250.000 kr., soleiðis at játtanin samanlagt varð 983.000 kr. Á fíggjarlógini fyri 2020 og 2021 vóru tí nóg mikið av peningi til, at nevndirnar saman kundu seta ein samskipara og skrivara í 30 tíma starv fyri báðar nevndirnar. Nevndin sendi í 2021 umbøn um hægri játtan til landsstýriskvinnuna í javnstøðumálum. Umbønin varð gingin á møti, og við árslok 2021 eydnaðist táverandi landsstýriskvinnuni at fáa til høldar 250.000 kr. afturat til javnstøðumál. Harvið var loksins møguligt, at fáa akademiskan skrivara og samskipara at arbeiða fulla tíð á Javnstøðuskrivstovuni, sum húsast í Almanna- og mentamálaráðnum.

Við hesum verður ársfrágreiðingin hjá javnstøðunevndini fyri 2023 løgd fram.
Til ber at venda sær til skrivstovuna við at ringja á 734064 ella senda teldubræv til javnstoda@javnstoda.fo.

Bjørk Maria Kunoy, forkvinna

Javnstøðu nevndin

# 1. Javnstøðunevndin 2023

Hesi sita í javnstøðunevndini fyri valskeiðið 2023 til 2026:

- Bjørk Maria Kunoy, umboð fyri Føroya landsstýri og forkvinna
- Jógvan Philbrow, umboð fyri løntakarar
- Jórun Gardar, umboð fyri arbeiðsgevarar
- Pætur Zachariasson, umboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Gunnhild Persson, umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

Varalimir eru:

- Niels Uni Dam, umboð fyri Føroya landsstýri og næstformaður
- Mary Antonsdóttir, umboð fyri løntakarar
- Marius Thomassen, umboð fyri arbeiðsgevarar
- Gunvá Magnussen, umboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Elin Holm, umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

Fremsta uppgávan hjá javnstøðunevndini er at hava eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin. Endamálið við javnstøðulógini er, at beina burtur allan mismun vegna kyn. Javnstøðunevndin skal harafturat ráðgeva myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum, umframt at gera tilmæli í javnstøðumálum.

Javnstøðunevndin hevur sambært javnstøðulógini uppgávuna, at viðgera klagur frá fólki um mismun vegna kyn.

Harumframt er javnstøðunevndin kærumyndugleiki í lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Eftir at løgtingsval varð hildið tann 8. desember 2022, skuldi nýggj javnstøðunevnd setast fyri valskeiðið 2023 til 2026. Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum, og eisini landsstýriskvinna í javnstøðumálum, setti nýggju nevndina á fundi í Almanna- og mentamálaránum tann 26. apríl 2023.

Í 2023 setti sitandi javnstøðunevnd sær fyri, serliga at arbeiða við javnstøðuspurningum viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum, eitt nú barsilsøkið og býti av óløntari arbeiðstíð.

Umframt at arbeiða við egnum málum, arbeiðir nevndin víðari við ávísum átøkum, ið upprunaliga vóru partur av virkisætlanini, sum táverandi landsstýriskvinna í javnstøðumálum, Eyðgunn Samuelsen, lat gera í 2018. Hesi átøk eru:

- Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum
- Átak 15: Gera neyðug átøk til frama fyri útlendskar kvinnur
- Átak 16: Javnstøðupolitikk á arbeiðsplássum
- Átak 23: Almenn kunning um Kvinnurættindasáttmálan

Sitandi landsstýri hevur sett sær fyri, at tryggja javnstøðu í samfelagnum, og at ganga á odda, tá ið fólk verða vald til Landsstýrið og aðrar álitissessir. Landið skal somuleiðis ganga


Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo

á odda, at tryggja betri javnvág í lønini millum kvinnur og menn. Samgongan hevur eisini sett sær fyri, at enduskoða javnstøðulógina.

Javnstøðunevndin fer at virka fyri og fylgja við í arbeiðinum, at endurskoða javnstøðulógina.

## 2. Eftirlit og undantaksloyvi

Sambært § 8 í javnstøðulógini skal kynsbýtið í øllum almennum nevndum, ráðum og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, vera javnt, og er tað skylda hjá javnstøðunevndini, at hava eftirlit við, at henda ásetingin verður hildin.

### Almennar nevndir og ráð

Av teimum 139 almennu nevndunum og ráðunum var støðan í 2023[1] hendan býtt á stjórnarráð:

| Stjórnarráð | Nevndarlimir | **Menn** | **%** | **Kvinnur** | **%** |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 49 | 35 | **71** | 14 | **29** |
| Almanna- og mentamálaráðið | 134 | 72 | **54** | 62 | **46** |
| Fíggjarmálaráðið | 13 | 8 | **61,5** | 5 | **38,5** |
| Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið | 23 | 17 | **74** | 6 | **26** |
| Heilsumálaráðið | 56 | 31 | **55** | 25 | **45** |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 146 | 96 | **66** | 50 | **34** |
| Umhvørvismálaráðið | 89 | 58 | **65** | 31 | **35** |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 95 | 53 | **56** | 42 | **44** |
| Løgmálaráðið | 109 | 64 | **59** | 45 | **41** |

[1] Uppteljingin er gjørd eftir yvirliti hjá Løgmansskrivstovuni, útskrivað tann 24. apríl 2024. Sæst her: https://www.lms.fo/fo/arbeidsoeki/stjornarsamskipan/almennar-nevndir-og-rad



Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo

Til samans vóru 714 nevndarlimir, harav *434* menn og *280* kvinnur, ella 60,8% menn og 39,2% kvinnur. Javnasta kynsbýtið er í Almanna- og mentamálaráðnum, sum eisini varar av javnstøðumálum. Ójavnasta kynsbýtið er í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

Til samanberingar var kynsbýtið í almennum nevndum og ráðum í 2022: *461* menn (61,4%) og *287* kvinnur (38,4%). Í 2019 var kynsbýtið *472* menn (62,5) og *283* kvinnur (37,5).

Her er einans talan um nevndir og ráð, sum sjálvt fyrisitingarvaldið, ella almenni myndugleikin, útnevnir.

## Undantaksloyvi

Sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini skal fyrisitingarvaldið søkja javnstøðunevndina um undantaksloyvi, um serligar grundir eru fyri, at nevndir og ráð ikki hava kynsliga javnvág.

- Í 2023 fekk javnstøðunevndin eina umbøn um undantaksloyvi
- Í 2022 fekk javnstøðunevndin fýra umbønir um undantaksloyvi
- Í 2021 fekk javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2020 fekk javnstøðunevndin eina umbøn um undantaksloyvi
- Í 2019 fekk javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2018 fekk javnstøðunevndin fimm umbønir um undantaksloyvi

## Ein umbøn um undantak frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum

Í sambandi við at Stýrið fyri Trygdargrunn fiskivinnunar skuldi veljast av nýggjum, vendi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið sær til javnstøðunevndina fyri at vita, um nevndin tók undir við niðurstøðu ráðsins um, at Stýrið fyri Trygdargrunn fiskivinnunar ikki var fevnt av ásetingunum í javnstøðulógini um eins nógvar limir av báðum kynum. Í fyrstu atløgu vildi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið vita, um javnstøðunevndin metti Stýrið vera fevnt av nevndu ásetingunum. Metti javnstøðunevndin, at so var, vildi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið í aðru atløgu biðja um undantaksloyvi.

Eftir at hava gjørt løgfrøðiliga meting av spurninginum, var niðurstøðan hjá javnstøðunevndini, at Stýrið fyri Trygdargrunn fiskivinnunar er fevnt av ásetingunum í § 8 í javnstøðulógini. Tískil viðgjørdi nevndin umbønina um undantak frá ásetingunum um eins nógvar limir av báðum kynum.

Tá viðkomandi feløg, sum ráðslimir skulu umboða, hava stóra yvirvág av øðrum kyninum, er talan um serliga grund fyri, at kynsumboðanin ikki er jøvn. Í hesum førinum høvdu viðkomandi feløg bara menn í uppskoti til umboð og varaumboð í Stýrið fyri Trygdargrunn fiskivinnunar. Javnstøðunevndin játtaði umbønini frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

## Endurskoðan av klagumáli sbrt. lóg um at bannað mismuni orsakað av breki

Umframt at virkisøkið hjá javnstøðunevndini er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, er javnstøðunevndin eisini klagumyndugleiki, tá ið klagur verða viðgjørdar um brot á løgtingslóg um at banna mismuni á

arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Tann 16. november í 2023 fekk javnstøðunevndin áheitan frá MEGD um at upplýsa, hvat var farið fram í undanfarnum máli, har javnstøðunevndin gjørdi ta niðurstøðu, at brot var framt á lógina um at bannað mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Málið snúði seg um, at ein lesandi, ið ber brek, ikki slapp upp til endurpróvtøku á Fróðskaparsetrinum. Javnstøðunevndin tók áheitanina til eftirtektar og bað avvarðandi partar um, at lýsa tilgongdina eftir at javnstøðunevndin gjørdi sína niðurstøðu, vísandi til, at tað er eisini ein uppgávan hjá JSTN at hava eftirlit við, at brot á nevndu lóg verða rættað. Málið var enn í gongd við ársenda 2023.

# 3. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi

Umframt klagur frá borgarum um mismun vegna kyn, kann eisini vera talan um fyrispurningar, har borgarar o.o. spyrja ella gera vart við møguligan mismun vegna kyn.

## Umbøn um at søkja eftir kvinnuligum starvsfólki

Tann 28. apríl fekk javnstøðunevndin umbøn frá privatari fyritøku um undantaksloyvi til at søkja miðvíst eftir kvinnuligum starvsfólki, tí fyritøkan kundi ynskt sær fleiri kvinnur í sítt toymi.

Í nýggjari vegleiðing hjá javnstøðunevndini í sambandi við umsóknir um undantak sambært § 1, stk. 2 í javnstøðulógini, verður tilskilað, at nevndin skal taka hædd fyri hesum fýra meginreglum, um undantak skal verða givið:

Undantak kann verða givið sum liður í at

- byrgja upp fyri og basa søguligum mismuni
- ganga ímóti aktuellum og diskriminerandi forðingum
- tryggja luttøku hjá (kyns)bólkum, sum hava verið útihýstir og tryggja at teirra luttøka verður umboðað
- skapa fyrimyndir og røkka javnstøðu í framtíðini

Eitt nú kann javnstøðulógin gera undantak til, at lýst verður eftir bara øðrum kyninum til tess at gera positiva diskriminatión, um so er, at talan er um eitt samfelagsøki, ið av søguligum ella vanabundnum orsøkum bert ella í høvuðsheitum hava knýtt annað kynið at sær.

Javnstøðunevndin gjørdi av ikki at ganga umbønini á møti, tí nevndin metti, at grundgevingin hjá fyritøkuni ikki innihelt slík atlit, ið heimila javnstøðunevndini at geva undantak sambært § 1, stk. 2 í javnstøðulógini. Javnstøðunevndin legði tó aftrat, at fyritøkan var vælkomin at venda aftur, um okkurt var at leggja aftrat grundgevingini.

## Tvey undantøk at lýsa eftir ávísum kyni

Javnstøðunevndin fekk í tveimum førum umbøn frá almennari svimjihøll um undantaksloyvi frá § 3, stk. 2 í javnstøðulógini, sum ásetir, at ikki er loyvt arbeiðsgevara at lýsa eftir fólki til arbeiðis, har tað á nakran hátt bendir á, at annað kynið hevur fyrimun. Í øðrum førinum var talan um kvinnuligt starvsfólk, og í hinum um mannligt starvsfólk. Í báðum førunum var talan um størv, ið millum annað fevndu um at røkja uppgávur í

skiftingarrúmum. Tað er eyðsæð, at kyn er viðkomandi fyri hetta, og tí vórðu báðar umbønirnar gingnar á møti. Tó so minti nevndin Svimjihøllina í Gundadali á, at tað í starvslýsingini skuldi verða grundgivið fyri, hví talan er um kynsbundin størv.

### Undantak at lýsa eftir mannligum stuðli

Tann 14. Juni fekk javnstøðunevndin umbøn frá fólkaskúla um, at søkja eftir mannligum stuðli til drong, ið var næmingur við serligum tørvi. Í umbønini greiddi skúlin millum annað frá, at kvinnur hava ikki altíð atgongd til støð, har dronginum tørvar hjálp, eitt nú á vesinum. Eftir at hava viðgjørt umbønina metti nevndin, at umstøðurnar í málinum høvdu við sær, at umrødda starvið var treytaleyst kynsbundið. Grundgevingin var, at arbeiðsuppgávurnar – bæði í mun til praktisk viðurskifti og í mun til blygdanina hjá dronginum – í stóran mun best vórðu framdar av persónum av kallkyni. Mett varð, at umbønin tí leyk treytirnar fyri undantøku sambært § 3, stk. 2 í javnstøðulógini.

## Áheitan á UMR viðv. Býarskipanarnevndini sbrt. jstl §8

Eftir at javnstøðunevndin varð varug við, at Býarskipanarnevndin, ið Umhvørvismálaráðið varar av, var sett saman soleiðis, at hon var í stríð við ásetingarnar í § 8 í javnstøðulógini um javna kynsumboðan í almennum nevndum og ráðum, heitti nevndin tann 7. septembur á landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, um at boða frá, hvussu frameftir bleiv tryggjað, at nevndu ásetingarnar vórðu hildnar. Í svari til javnstøðunevndina tann 14. septembur varð greitt frá, at tá ið Býarskipanarnevndin skuldi veljast av nýggjum tann 1. august 2024, fór Umhvørvismálaráðið at heita á partarnar, sum bidnir verða um uppskot, um at hava javnstøðulógina í huga. Hetta fyri at bæði kvinna og maður vera í hvørjum uppskoti til nevndina. Umhvørvismálaráðið segði seg ætla at tryggja, at komandi tilnevning fylgir ásetingunum í javnstøðulógini. Javnstøðunevndin fer at fylgja gongdini.

## Fyrispurningur um kynsbýtið í Barnaverndarstovnum

Tann 15. august fekk javnstøðunevndin fyrispurning frá borgara um hagtøl um kynsbýtið millum starvsfólk á barnaverdarstovnum undir Almannaverkinum, og somuleiðis um kynsbýtið millum teirra, ið lesa námsfrøði á Setrinum. Borgarin spurdi, um nevndin hevði nevndu hagtøl, og harnæst, um nevndin visti um nakað átak hjá Almannaverkinum til frama fyri at javnviga kynsbýtið millum síni starvsfólk.

Javnstøðunevndin bað Lestrarskrivstovuna á Fróðskaparsetrinum um hagtøl um kynsbýtið millum teirra, ið vóru skrásett sum námsfrøðilesandi. Táverandi kynsbýti var 149 kvinnur og 19 menn, ella 88% kvinnur og 12% menn. Sambært yvirliti, sum javnstøðunevndin bað um at fáa frá Almannaverkinum, var kynsbýtið millum tey fastløntu á barnaverndarstovnum undir Almannaverkinum 47 kvinnur, og 11 menn, ella 81% kvinnur og 19% menn. Út frá sama yvirliti roknaði nevndin seg fram til, at umleið 20% av teimum mánaðarløntu og tímaløntu vóru menn, meðan 80% vóru kvinnur. Javnstøðunevndin frætti frá Almannaverkinum, at einki átak var tá til frama fyri, at javnviga kynsbýtið. Nevndin kunnaði borgaran um hesar upplýsingar og legði aftrat, at samfelagið hevur tørv á, at rætta skeiva kynsbýtið millum teirra, ið arbeiða við umsorgan, røkt, námsfrøði og tílíkum, og at millum týdningarmiklastu avbjóðingarnar í javnstøðuarbeiðinum er spurningurin um, at býta umsorganarleiklutin í samfelagnum javnari millum kvinnur og menn. Í svari til borgaran segði nevndin, at hon áhaldandi arbeiðir við hesari avbjóðingini.

## 4. Vegleiðing um nýtslu av § 8 í javnstøðulógini

Stutt eftir at javnstøðunevndin var sett tann 26. apríl 2023, gjørdi nýggja nevndin í samráð við løgfrøðing av, at lata gera yvirskipaða vegleiðing fyri ytru kørmunum fyri § 8 í javnstøðulógini. Hetta fyri at styrkja arbeiðið hjá nevndini, at hava eftirlit við, at § 8 í javnstøðulógini verður hildin. Sambært ásetingini skulu almennar nevndir, ráð umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sambært ásetingini er sama galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir. § 8, stk. 2 í javnstøðulógini ásetir harumframt, at tá serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

Tann 17. desembur 2023 var endaliga vegleiðingin um nýtslu av § 8 í javnstøðulógini liðugt og klárt hjá nevndini at nýta í arbeiðinum, at hava eftirlit við ásetingini um javnt kynsbýti í almennum nevndum, ráðum og líknandi. Vegleiðingin fevnir eisini um, nær ávísir arbeiðsbólkar, ið eru fyrisitingarliga settir, eru fevndir av ásetingini í § 8, stk. 1 í janvstøðulógini.

## 5. Hoyringar og tilmæli

### Uppskot um broytt starvsheiti hjá løgtings- og landsstýrisfólki

Tann 17. apríl vóru javnstøðunevndin og Demokratia kallað inn til fundar í § 25 nevnd Løgtingsins í sambandi við nevndarviðgerðina av uppskotum um broytingar í stýrisskipanini og tingskipanini um broytt starvsheiti hjá løgtings- og landsstýrisfólki. Uppskotini høvdu við m.a. við sær, at kvinnur formliga skuldu kunna kalla seg "løgtingskvinnur" í staðin fyri "løgtingsmenn". Nevndirnar báðar vóru samdar um, at uppskotini vóru týdningarmikil stig fram á javnstøðuleið.

### Uppskot um at hækka hámarkið fyri barsilsútgjald

Javnstøðunevndin varð kallað inn til fundar í rættarnevndini tann 14. novembur at umrøða lógaruppskot um hækkan av hámarksupphædd fyri barsilsútgjald. Á fundinum gjørdi javnstøðunevndin greitt, at skynsamasta fíggjarliga loysnin hjá teimum flestu barnafamiljunum er, at mamman fer í barnsburðarfarloyvi, tí menn fáa ofta meira í løn. Hóast ein hækkan av hámarksupphæddini við 3000 krónum var eitt stig á røttu leið, metti nevndin, at størri tøk skulu til, fyri at gera neyðugu broytingina, fyri at minka um inntøkumunin millum kvinnur og menn. Javnstøðunevndin legði aftrat, at umframt útgjaldshámarkið, eru eisini aðrir tættir í barsilsskipanini, ið kunnu eggja pápum til at taka størri lut í barnsburðarfarloyvinum. Eitt nú átti skipanin at verðið smidligari, soleiðis at barnafamiljur fáa størri rásarúm at gera av, nær mamman og pápin kunnu fara í barnsburðarfarloyvi, og harvið at sameina familju- og arbeiðslív. Harumframt upplýsti nevndin, at royndirnar í grannalondumi, hava víst, at amboðið, sum munar best til tess at fáa javnari barsilsbýti er, at marka ein hóskandi part av farloyvinum til pápar. Javnstøðunevndin legði aftrat, at barsilsskipanin hevur ein avgerandi leiklut, tá ið tað snýr seg um javnstøðu millum kvinnur og menn, bæði hvat viðvíkur lønarmunin millum kvinnur og menn og í mun til leiklutabýtið í heiminum og familjuni.

## Tilmæli í sambandi við endurskoðan av fosturtøkulógini

Í sambandi við ætlanirnar hjá Landsstýrinum um at endurskoða fosturtøkulógina, mælti javnstøðunevndin til, at lógin varð broytt soleiðis, at kvinnan, innan fyri eitt rímiligt og virðiligt mark, fær ræðisrættin at velja fosturtøku. Í tilmælinum, ið varð sent tann 2. oktobur, grundgav nevndin millum annað við, at verandi fosturtøkulóg, ið er frá 1956, er millum tær strangastu í Evropa og stavar frá eini tíð, tá ræðisrætturin hjá kvinnuni í samfelagnum var munandi øðrvísi enn hann er í dag. Lógin skapar ótryggar og óvirðiligar karmar fyri kvinnur, ið ynskja fosturtøku. Samfelagið hevur skyldu til, at tryggja kvinnum møguleika fyri at velja fosturtøku á einum tryggum og upplýstum grundarlagi.

## Tilmæli um klædnareglur í fólkaskúlum

Eftir at tað í maimánaði kom undan kavi, at Vestmanna skúli hevði orðað nýggjar klædnareglur fyri allar sínar skúlanæmingar, var nógv alment kjak um spurningin um, í hvønn mun ein fólkaskúli kann krevja, hvørjum klæðum skúlabørn ganga í. Klædnareglurnar hjá skúlanum ásettu, at eitt nú stuttir niðurdeiliar, buksur ið sita ov niðarlaga, niðurringaðar blusur og nalvablusur vóru óhóskandi til skúlabrúks. Reglurnar vórðu sambært Vestmanna skúla ásettar til tess at tryggja, at øll vóru hóskandi ílatin, soleiðis at skúlin sum arbeiðsumhvørvi ikki varð ótarnaður.

Í hesum sambandi varskógvaði javnstøðunevndin um, at klædnareglurnar hjá skúlanum vóru orðaðar soleiðis, at spurnartekin kundi setast við, um munur er á, hvat verður væntað av gentum og dreingjum. Av tí at klædnareglurnar einamest snúðu seg um klæðir, ið gentur vanliga ganga í, vóru klædnareglurnar mettar at hava neiliga ávirkan á sjálvsfatanina hjá børnum og ungdómi. Í tíðindskrivi tann 13. mai 2023 gjørdi javnstøðunevndin greitt, at klædnareglurnar samsvaraðu ikki við grundleggjandi hugsjónir um javnvirði og javnstøðu í dagsins samfelagi. Nevndin legði aftrat, at signalvirðið hevur stóran týdning, sama um hetta var tilætlað ella ikki. Tí týdningarmikið er at hava javnstøðu í huga, tá samskift verður í øllum viðurskiftum - serliga, tá talan er um almennar stovnar, sum varða av børnum og ungum.

# 6. Kunnandi virksemi

## Pallborðskjak á Háskúlanum 8. Mars

Í sambandi við tiltak á Háskúlanum í Havn altjóða kvinnustríðsdagin 8. mars, skipaði javnstøðunevndin saman við Amnesty Føroyum fyri pallborðskjaki um trupulleikar av niðrandi málburði á sosialum miðlum.

Luttakarar vóru:

- Annika Olsen, lands- og kommunupolitikari
- Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum
- Súsanna Olsen, námslektari í stjórnmálafrøði

Barbara Holm stýrdi kjakinum.

Javnstøðu nevndin

Felags boðskapurin var, at kvinnur eiga at standa saman um at siga frá, tá tær eru fyri niðrandi málburði. Annika, Ruth og Súsanna vóru á einum máli um, at tey, ið hava neyðuga pallin til tess, eiga at nýta sín framíhjárætt til at tala at ágangi.

## Framløga av javnstøðukanning

Í sambandi við almenna framløgu av javnstøðukanningini, sum javnstøðunevndin, Demokratia og Almanna- og mentamálaráðið lótu gera í samstarvi við Fróðskaparsetrið, var javnstøðunevndin ein av fyriskiparunum av almennum tiltaki í Kongshøll í Havn tann 2. mai. Eftir at Erika Anne Hayfield, Herit Albinus og Heini í Skorini, granskarar, høvdu lagt høvuðsniðurstøðurnar frá kanningini fram, var orðaskifti um kanningarúrslitini og um javnstøðuavbjóðingar á ymsum virkisøkjum í samfelagnum.

Kjakluttakarar vóru:

- Bjørk Maria Kunoy, forkvinna í javnstøðunevndini
- Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í javnstøðumálum
- Erika Anne Hayfield, lektari
- Martin Tvede Zachariassen, rektari á Fróðskaparsetrinum
- Niels Winther, stjóri í Vinnuhúsinum

## Semjuskjal

Í sambandi við, at úrslitini frá javnstøðukanning, sum javnstøðunevndin lat gera saman við Demokratia og Almanna- og mentamálaráðnum í 2023, vístu, at fólk í Føroyum fataðu hugtakið *javnstøða* á ymsan hátt, gjørdi javnstøðunevndin av, at orða semjuskjal, ið staðfesti, hvussu nevndin sjálv fatar hugtakið. Semjuskjalið liggur til grundar fyri arbeiðinum hjá nevndini framyvir.

Í semjuskjalinum ber millum annað til at lesa, at javnstøðunevndin viðurkennir, at menniskju eru ymisk, og at ávísir sosialir, mentanarligir og strukturellir munir kunnu elva til mismun í einum demokratiskum samfelag, ið er grundað á hugsjónir um javnstøðu. Við støði í hesum arbeiðir javnstøðunevndin til frama fyri javnstøðu grundað á teirri grundfatan, at

- Javnrættindi eru, tá menn og kvinnur eru líka fyri lógini
- Javnstøða er, tá menn og kvinnur hava somu møguleikar, atgongd, skyldur og rættindi
- Javnstøða er, tá javnvág er millum menn og kvinnur, og tá menn og kvinnur verða javnt vird
- Javnstøða er, tá ongar óneyðugar forðingar, avbjóðingar ella munir eru, ið eru tengd at kyni".

Her ber til at lesa semjuskjalið umvegis heimasíðuna hjá javnstøðunevndini: *Semjuskjal — Javnstøðunevndin (javnstoda.fo)*

## Mannfólkadagur

Í sambandi við altjóða mannfólkadagin tann 19. Novembur, skipaði javnstøðunevndin saman við Sinnisbata fyri almennum tiltaki í OY í Havn undir heitinum 'Menn, sálarheilsa og

felagsskapur'. Tiltakið var eitt høvi til, at seta mannfólk og javnstøðu á breddan, og saman vórður spurningar umrøddir um eitt nú kynsmentan, kropsliga- og sálarliga heilsu, einsemi og felagsskap. Á skránni var fyrilestur við Svend Aage Madsen, granskara og formanni í Forum for Mænds Sundhed. Eisini var skemt við Svannu Hentze í Gong, og Lyon Hansen spældi livandi tónleik. Harumframt var pallborðskjak við Pál Weihe, yvirlækna og professara í fólkaheilsu, Magna Højgaard, leiðari fyri RÓWT og Brandi Mortensen Nolsøe, samskipara hjá javnstøðunevndini um menn og sálarheilsu. Bjarni Arge var vertur og stýrdi pallborðskjakinum.

## Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum

Javnstøðunevndin hevur arbeitt víðari við ávísum átøkum, sum upprunaliga vóru partur av virkisætlanini frá 2018, ið táverandi landsstýriskvinna í javnstøðumálum, Eyðgunn Samuelsen lat gera. Eitt nú gjørdi javnstøðunevndin ein frymil til almenn og privat arbeiðspláss at evna til sín egna javnstøðupolitikk, sum liður í átaki 16 í upprunaligu virkisætlanini. Frymilin er vegleiðandi, og ætlanin við frymlinum er, at eggja føroyskum arbeiðsplássum til at seta javnstøðupolitikk í verk. Í fyrstu atløgu hevði javnstøðunevndin í hyggju, at taka stig til fund við almennar arbeiðsgevarar, fyri at vegleiða tey um, at gera javnstøðupolitikk á føroyskum arbeiðsplássum við støði í frymlinum. Síðani ætlaði nevndin, at varpa ljós á javnstøðu á arbeiðsplássum í almenna rúminum. Hesar ætlanir skuldu setast í verk í 2024.

### Ráðstevnan Forum Jämställdhet 2023

Eins og undanfarna ár var umboð fyri javnstøðunevndina á ráðstevnuni Forum Jämställdhet, ið hvørt ár er karmur um størstu javnstøðustevnuna í Svøríki, ið er kelda til íblástur til fakliga arbeiðið hjá javnstøðunevndini. Á skránni var millum annað fyrilestrar, verkstovur, røður umframt netverkan. Skrivarin hjá javnstøðunevndini greiddi frá summum av niðurstøðunum frá ráðstevnuni í føroysku fjølmiðlunum.

## Norðurlendskur umboðsfundur í Stockholm

Javnstøðunevndin er partur av norðurlendskum netverki, sum allir javnstøðumyndugleikarnir í norðurlondum luttaka í. Í 2023 var Svøríki vertur, og var árligi fundurin hildin í hølunum hjá svenska javnstøðu- og diskrimineringsumboðsmanninum í Stockholm. Millum evnini á skránni vóru aktuellar avbjóðingar hjá CEDAW nevndini, leikluturin hjá javnstøðumyndugleikunum í ljósinum av vaksandi mismuni í Norðurlondum, avleiðingar av menningini av vitlíki fyri javnstøðuarbeiðið, arbeiðskorini hjá tvíkyndum og transpersónum og annað. Javnstøðunevndin verður vertur í 2024.

## Arbeiðsdagur um abort

Í sambandi við, at javnstøðunevndin tann 6. oktobur varð boðin til hoyringar í Løgmálaráðnum um endurskoðan av fosturtøkulógini, skipaði nevndin fyri arbeiðsdegi sum liður í fyrireikingini til hoyringina við tí endamáli, at taka støðu til fosturtøkuspurningin á sterkum fakligum grundarlagi. Á arbeiðsdegnum, sum varð hildin í Almanna- og mentamálaráðnum tann 28. septembur 2023, varð fosturtøkuspurningurin lýstur úr fleiri fakligum sjónarhornum: tí etiska, gudfrøðiliga, løgfrøðiliga, læknafrøðiliga, heimspekiliga, mýlalívfrøðiliga og mannfrøðiliga.



Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo

Tey, ið hildu upplegg fyri nevndini hendan dagin vóru:

- Kathrine Bang Lilleør, sóknarprestur og Ph.d. í gudfrøði
- Turið Hermansdóttir, Ph.d. í mannfrøði
- Noomi Gregersen, Ph.d. í mýlalívfrøði
- Ann Danielsen, serlækni í kvinnusjúkum
- Jógvan D. Hansen, heimspekingur
- Bjørk Maria Kunoy, løgfrøðingur og forkvinna í Javnstøðunevndini

Undir hoyringsfundinum um endurskoðan av fosturtøkulógini í Løgmálaráðnum hin 29. septembur 2023 mælti Javnstøðunevndin til, at kvinnan, innanfyri eitt virðiligt og rímiligt mark, fær ræðisrættin til at taka støðu til fosturtøku.

## Týðing av kvinnurættindasáttmálanum

Í sambandi við altjóða kvinnudagin 8. mars gav javnstøðunevndin út lættlisnan bókling við eini styttari útgávu av kvinnurættindasáttmalanum hjá ST, eisini róptur CEDAW. viðmerkingarnar, sum CEDAW-nevndin hevur gjørt um støðuna í Føroyum, er, at Føroyar skulu upplýsa meiri um kvinnurættindasáttmálan, og hvat hann merkir fyri føroyska samfelagið. Nýggi bóklingurin varð gjørdur sum liður arbeiðinum hjá javnstøðunevndini, at gera kvinnurættindasáttmálan meira kendan millum fólk.

Bóklingurin, ið fekk heitið *Kvinnurættindi í stuttum*, er ókeypis og fæst á bæði føroyskum og enskum á heimasíðuni hjá javnstøðunevndini eins og í pappírsútgávum í ymsum almennum rúmum. Enska heitið er *Women's rights at a glance*.

### Týðing av heimasíðu til enskt

Í sambandi við, at javnstøðunevndin ynskti at heimasíða nevndarinnar, ið inniheldur upplýsingar um klagumøguleikan og annað fakligt tilfar, skuldi týðast til enskt, soleiðis at ikki-føroyskt talandi borgarar fingu betri atgongd, gjørdi nevndin í aprílmánaði av, at umbiðja týðingararbeiði. Tann 13. novembur fekk javnstøðunevndin lidna arbeiðið frá yrkisligum týðara, ið hevði umsett partar av heimasíðuni hjá javnstøðunevndini til enskt. Enska útgávan av heimasíðuni bleiv sostatt tøk við árslok í 2023.

## Kunning til útlendskar kvinnur

Sum liður í sonevnda átaki 15, ið upprunaliga stóð í virkisætlanini, sum varð kunngjørd í sambandi við javnstøðupolitikkin hjá Almannamálaráðnum í 2018, fóru javnstøðunevndin og Útlendingastovan undir samstarv, ið snúði seg um, at greina støðuna hjá útlendskum kvinnur, umframt at seta neyðug átøk í verk. Leygardagin 27. mai var Fjølsmiðjan hjá ALS í Havn karmur um royndarskeið, ella verkstovu, fyri útlendskar kvinnur. Endamálið við royndarskeiðnum var, at útlendskar kvinnur kundu verða sjálvbjargnar og luttaka í føroyska samfelagnum á jøvnum føti við onnur. Skeiðið snúði seg millum annað um, at luttaka í føroyska arbeiðsmarknaðinum, rættindir og skyldur hjá borgarum, almennar tænastur, familjulív og annað. Afturat royndarskeiðnum úrslitaði samstarvið í arbeiðsbók við kunnandi tilfari umframt at videoupptøkur við kunnandi tilfari um somu evni. Hildið verður ætlandi fram, at skipa fyri líknandi verkstovum fyri útlendskum kvinnum.

### Barsilsreglur í almennum sáttmálum

Tann 16. mai fekk javnstøðunevndin fyrispurning frá limi í almennari fakfelagsnevnd um, at hann helt part av sínum sáttmála vera brot á ásetingarnar í § 3, stk. 1 og 2 í javnstøðulógini um mismun vegna kyn á arbeiðsmarknaðinum. Málið snúði seg um rættin hjá mannligum starvsfólki til barsil við løn. Í sáttmálanum stóð, at kvinnur – og ikki menn – hava rætt til barsil við løn í 24 vikur, áðrenn tær fara í barsilsskipanina við hámarks útgjaldinum 25.000 kr. Eftir at hava kannað málið, kom javnstøðunevndin fram til ta niðurstøðu, at tað er ymiskt, hvussu feløg tulka hesa orðingina, sum annars líkjast í ymsum sáttmálum. Nevndin gjørdi av í fyrstu syftu, at biðja Fíggjarmálaráðið um formliga frágreiðing um, hvussu tey tulka rættindi við barsil við løn til kvinnur og menn, vísandi til ymsu galdandi sáttmálarnar, og barsilslógina. Eftir at hava tikið málið upp á fundi við Fíggjarmálaráðið, metti javnstøðunevndin, at galdandi rættindi bæði í almennum sáttmálum og í barsilslógini, ið viðvíkja rættindum hjá kvinnum og monnum til barsil við løn, vóru tey somu í flestum almennum sáttmálum. Tó metti nevndin eisini, at galdandi rættindi góvu høvi til, at viðgera fleiri viðkomandi spurningar úr javnstøðusjónarhorni. Í hesum sambandi gjørdi nevndin sær ætlanir um, at viðgera alt barsilsøkið neyvari.

## 7. Virkisøki og arbeiðssetningur

Javnstøðunevndin er sjálvstøðug nevnd, ið er skipað undir Føroya landsstýri. Javnstøðumálsøkið varð í sambandi við løgtingsvalið í september 2015 flutt úr Vinnumáláráðnum í Almannaráðið at umsita í 2016. Virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

- at hava eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, og at viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, § 9 og § 11, stk. 1.
- at virka fyri at beina burtur allan mismun vegna kyn innan øll samfelagsøkir og luttaka í samfelagskjakinum við atliti at javnstøðuspurningum og veita upplýsing grundaða á ta vitan, nevndin í arbeiði sínum fær
- at virka fyri eins møguleikum til útbúgving, arbeiði, yrkisligari og mentanarligari menning, § 1
- at virka sum ráðgevi hjá almennum stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum arbeiða við javnstøðumálum
- at geva tilmæli í javnstøðumálum, § 9
- at geva loyvi til frávik frá lógini viðvíkjandi starvslýsing o.ø., og viðvíkjandi setan av nevndum og ráðum, § 3 stk. 2 og § 8, stk. 2, umframt
- at kunna um javnstøðulógina og -nevndina. Harumframt er nevndin kærumyndugleiki í løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Harumframt er nevndin kærumyndugleiki í løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.



Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo

## 8. Nevndarlimir

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval og situr valskeiðið, ið løgtingið situr. Limir kunnu endurveljast. Sambært javnstøðulógini velur avvarðandi landsstýrisfólk eitt forfólk og tilnevnir eftir tilmæli frá feløgum og stovnum fýra aðrar limir, sum umboða

- Arbeiðsgevarar
- Løntakarar
- Skúla-, heilsu- og almannaverkið
- Kvinnufelagasamskipan Føroya

Sitandi javnstøðunevnd varð í 2023 tilnevnd av landsstýriskvinnuni í javnstøðumálum, Sirið Stenberg.

Limir í javnstøðunevndini eru:

- Bjørk Maria Kunoy, forkvinna, umboð fyri Føroya landsstýri
- Jógvan Philbrow, umboð fyri løntakarar
- Jórun Gardar, umboð fyri arbeiðsgevarar
- Pætur Zachariasson, umboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Gunnhild Persson, umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

Varalimir eru:

- Niels Uni Dam, næstformaður, umboð fyri Føroya landsstýri
- Mary Antonsdóttir, varaumboð fyri løntakarar
- Marius Thomassen, varaumboð fyri arbeiðsgevarar
- Gunvá Magnussen, varaumboð fyri skúla-, heilsu- og almannamál
- Elin Holm, varaumboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya

## 9. Játtan

Á fíggjarlógini fyri 2019 vórðu játtaninar til Javnstøðunevndina og Demokratia lagdar saman, og harumframt vórðu 250.000 kr lagdar afturat. Tá fíggjarlógin fyri 2022 bleiv samtykt, eydnaðist tað at fáa 200.000 krónur aftrat til Javnstøðunevndina. Hetta gjørdi, at loksins varð møguligt at hava ein fulltíðarsettan akademiskan skrivara og samskipara á Javnstøðuskrivstovuni.

Seinastu fimm árini hava játtanirnar til javnstøðunevndina verið:

- 2023: 912.000 kr.
- 2022: 880.000 kr.
- 2021: 847.000 kr.
- 2020: 671.000 kr.
- 2019: 635.000 kr.

Savnaða játtanin til javnstøðumál í 2023 var 1.322.000 kr., ið vóru markaðar soleiðis:

- 410.000 kr. til Kvinnuluttøku í politikki (Demokratia)
- 912.000 kr. til javnstøðunevndina


Javnstøðunevndin | Almannamálaráðið I Eirargarður 2, 5. hædd I 100 Tórshavn | Tlf. 73 40 64 | javnstoda@javnstoda.fo